# Claus liðugur í Blackpool

Claus Bech Jørgensen, sum 10 ferðir hevur spælt fyri føroyska A-landsliðið, er ikki longur partur av hópinum hjá Blackpool í næstbestu ensku deildini. Claus hevur spælt 100 dystir fyri Blackpool, men nú Ian Galloway, sum er venjari hjá felagnum, hevur nú sagt við spælaran, at hann ikki longur er ynsktur í hópinum, og tí stendur tað Claus Bech Jørgensen frítt at finna sær annað felag.



# Paris var mín Miyagi

26 ára gamli Paul Clapson, fyrrverandi KÍ-framherjin, stórtrívist í Íslandi. Hann og liðfelagarnir úr Afturelding hava fingið eina frálíka byrjan á nýggja kappingarári í næstbestu íslendsku deildini. Men sambært Clapson, er tað serliga takkað verið Tony Paris, at hann stendur seg so mikið væl í løtuni. - Tá eg skrivaði sáttmála við KÍ, var eg sannførdur um, at eg fór at menna meg undir leiðslu av Tony Paris. Hann hevði mítt álit. Vit vandu nógv saman, og eg gjørdi stór framstig. Hann var mín Mr. Miyagi, sigur Les Rosbifs, sum fylgir enskum fótbóltsleikararum í útlandinum.



í føroyska liðnum

## FAKTA um dystin

**Føroyar-Russland 1-0 (1-0)**
EM-undankapping, Gundadalur, týsdagin 9. juni kl. 19.00
1-0: Jóan Símun Edmundsson, 1.
**Dómari:** Alan Black (Norðurírland)
**Hjálpardómarar:** Andrew Neeson & John McDowell (Norðurírland)
**4. dómari:** Raymond Crangle (Norðurírland)
**Føroyar:** Jóan Pauli Jakobsen – Pætur T. Jørgensen, Rógvi S. Holm, Pól Jóhannus Justinussen, Erling Jacobsen – Róaldur Jacobsen, Kristoffur Jakobsen (Odmar Færø, 82. – Jóhan Ellingsgaard (Jann Martin Mortensen, 74.), Christian R. Mouritsen, Jóan Símun Edmundsson – Páll A. Klettskarð (Øssur M. Dalbúð, 93.)
**Á bonkinum:** Teitur M. Gestsson, Rói Danielsen, Rasmus F. Nielsen, Frank H. Poulsen
**Gult kort:** Pól Jóhannus Justinussen, Kristoffur Jakobsen
**Venjarar:** Bill McLeod Jacobsen & Heðin Askham
**Russland:** Sergey Pesyakov – Anton Koslov, Evgeny Makeev, Gia Gigalava, Georgy Shchennikov – Alexander Kokorin, Vladislav Ryshkov (Anton Sosnin, 46.), Alan Dzagoev (Igor Gorbatenko, 69.), Alexey Ionov – Alexander Prudnikov (Dmitry Ryzhov, 59.), Artem Dzyuba
**Á bonkinum:** Valery Polyakov, Roman Amirkhanov, Mikhail Mishchenko, Semen Fomin
**Gult kort:** Alexander Kokorin, Gia Gigalava
**Venjari:** Igor Kolyvanov
**UEFA-eygleiðari:** Wolfgang Thierrichter (Eysturríki)
**Dómaraeygleiðari:** Einar Halle (Norra)
**Áskoðarar:** 361

um fínt liðavrik, og at hann tískil ikki vildi taka nakran framum.

Tað er lætt at vera samdur við honum í tí. Men tað skal tó ikki undra, um eitt nú Rógvi Holm næstu ferð fer at fáa A-landsliðsboð.

## U21-avrikini hagartil

**EM undankapping 2009**

| | |
|---|---|
| 02.06.07: | Kroatia-Føroyar 2-0 (1-0) |
| 06.06.07: | Albania-Føroyar 1-0 (0-0) |
| 07.09.07: | Italia-Føroyar 2-1 (1-1) |
| 12.09.07: | Føroyar-Grikkaland 0-2 (0-2) |
| 12.09.07: | Føroyar-Aserbadjan 1-0 (1-0) |
| 17.10.07: | Føroyar-Kroatia 1-2 (1-2) |
| 17.11.07: | Føroyar-Albania 0-5 (0-1) |
| 21.11.07: | Føroyar-Italia 0-1 (0-0) |
| 06.09.08: | Aserbajan-Føroyar 2-2 (2-1) |
| 09.09.08: | Grikkaland-Føroyar 1-0 (0-0) |

**EM undankapping 2011**

| | |
|---|---|
| 06.06.09: | Føroyar-Rumenia 0-4 (0-2) |
| 09.06.09: | Føroyar-Russland 1-0 (1-0) |



*Johan Ellingsgaard var ein av seks nýggjum spælarum í føroysku byrjunaruppstillingini. Útskiftingin var kanska ógvuslig, men eftir úrslitið kann ikki ein fingur setast á venjaraavgerðina*